## DAGSINS MEINING

# Vandamikil støða

Tað tykist sum gølurnar hjá hersetingarvaldinum í Irak bara standa við og versna. Tá tað varð avdúkað, at krígsfangar vóru illa viðfarnir av amerkikansku hermegini í fongslum, gjørdist stór gøla. Fjølmiðlarnir avdúkaðu, at sera álvarsom brot vóru framd á mannarættindini og móti Genevesáttmálanum um viðferð av krígsfangum. Tá alt hetta kom fram lovaði amerikanska stjórnin, at slíkt skuldi ikki endurtaka seg og at tey seku skuldu verða hart revsað.

Men nú er aftur galið. Fjølmiðlarnir hava aftur avdúkað eina so grova gølu, at ein skal heilt aftur til Vietnamkríggið fyri at finna makan. Tey, sum eru komin upp í árini, minnast, hvussu ein fangi varð skotin fyri opnum skermi. Hetta elvdi til stóra gølu og stórar politiskar trupulleikar heima í USA. Nú er so tað sama hent - ein særdur uppreistrarmaður verður tikin fangi. Hann biður staðiliga um náði og verður skotin við køldum blóði, meðan at kalla allur heimurin hyggur at. Hetta er fyri tað fyrsta ein ráð og harðrend gerð. Fyri tað anmað er hetta drápið klárt brot á allar galdandi reglur um krígsførslu. Tað tykist sum hermenninir hava fríar hendur til at fara við fangunum, sum tað hóvar teimum. Hetta kann ikki halda fram. Vesturheimuirn kann ikki góðtaka ein so inhumanan og brotsligan atburð av amerikansku hermegini.

Men hvussu kan man vænta annað, tá hermenninir verða eggjaðir til tað versta av sínum arbeiðsgevara, verjumálaráðharranum Rumsfeld sjálvum. Tað er sum um, at signalini úr erva frá ovastu leiðsluni í verjumálaráðnum, har heykarnir sita við borðendan og har boðskapurin er hart móti hørðum, eingin nái og eygað fyri eygað líkasum hevur fest seg í hugaheimin hjá teimum einstøku hermonnunum eisini, ella nøkrum teirra. Vit hoyrdu jú, at boðini um eirindaleysu og beinhørðu forhoyrini í fongslum í Irak komu frá Rumsfeld sjálvum. Hetta er tað, sum er so ræðandi: at sera harðrendi og avgjørdi politikkurin hjá Bushfólkinum í veruleikanum førir til misgerðir sum hesa og sum so aftur hava við sær, hevnd og aftur hevnd. Tað er hjá ovastu leiðsluni í Pentagon, at vit skulu finna teir seku. Ikki á hermótinum. Við fræga vælúrslitinum hjá Bush og hansara útnevning av nýggjum heykum í stjórnini kunnu vit bara vænta uppaftur fleiri av slíkum misgerðum í framtíðini, og tað fer at fella aftur á okkum øll so ella so.

USA er skansi fólkaræðisins. USA er í Irak til tess at stovnseta eitt nútímans vestligt fólkaræði, ið byggir á virðing fyri menniskjuni og annars á øll vanlig mannarættindi. Við hesum í huga er torført at síggja, hvussu hetta projekt skal kunna eydnast. Ein kann ikki byggja upp eitt fólkaræði við harðendum og ódemokratiskum framferðarhættum. Morðið í moskuni, sum vit øll hava verið vitni til er ikki bert eitt brotsverk. Tað er eisini ein politisk óbótagerð, ið fer at seta politisku tilgongdina fram í móti fólkaræði langt aftur, ja, kanska beinleiðis at forkoma hesi tilgongd. Hetta er sostatt ein sera vandamikil støða. Danmark er við í hersetingini av Irak og er Danmark tí samsekt í teimum illgerðum, sum amerikansku hermenninir fremja har. Vit eruí ríkisfelagsskapi við Danmark, og tí dettur hetta eisini aftur á okkum. Tískil eigur okkara landsstýri at boða donsku stjórnini frá, at vit føroyingar fordøma slík brot á mannarættidnini og Genevesáttmálan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vit mugu seta krøv

**Petur í Gong**
*Formaður í Brúkarasamtakinum*

Tann mann elskar, tyktar mann. Soleiðis verður mangan tikið til, og liggur tað ein djúpur sannleikið í hesum orðum. Vit seta børnum okkara krøv, soleiðis at tey búnast, og megna tær avbjóðingar, ið lívið leggur teimum fyri. Hetta roknað vit sum ein natúrligan part av okkara skyldum, og vit eru fullgreið yvir, at uttan hesa tykt, verður tað ógvuliga trupult hjá børnunum at virka í samfelagnum, tá tey einaferð skulu standa á egnum beinum.

Henda myndin vísur seg eitt sindur ørvísi, tá talan er um krøv brúkarans til tær vørur og tænastur, ið verða bjóðaðar fram á heimliga marknaðinum. Í hesum sambandi eru vit ikki so von við at seta krøv og at vísa okkara ónøgd, um okkurt ikki var sum vit væntaðu ella fingu lovað. Ikki tí at vit eru so líkasæl ella tolin, men heldur tí vit ikki ynskja at traðka fram og verða eyðmerkt sum grenj.

Men hvussu munnu hesi væntandi krøv so ávirka tær fyritøkur, sum standa fyri útboðnum? Tað tykist ikki vera so lætt hjá hesum fyritøkum at klára seg í kapping við útlendskar fyritøkur. Hvørki heima ella úti. Eg skal ikki skera alt yvir ein kamb, tí onkur sólskinssøga finnist tó. Men tað er eyðvita, at fleiri fyritøkur í Føroyum kunnu einans klára seg í Føroyum við føroyskum viðskiftafólkum. Og helst uttan kapping frá nakrari útlendskari fyritøku. Hetta er ikki nøkur haldgóð loysn, um vit ynskja eina sterka vinnu, sum skal kunna virka á heimspallinum.

Seta vit, tað almenna og brúkarin, har aftur ímóti krøv, vil tað styrkja um okkara egnu vinnu, soleiðis at hon gert betur før fyri at virka ájavnt útlendskar fyritøkur, og á tann hátt í størri mun megnar at vinna sær marknað uttanfyri landoddarnar. Tað er sostatt ikki bara brúkarin, ið fær ágóða av, at krøv verða sett vinnuni.

Í útlondum vísa fleiri kanningar, at tess kræsnari brúkarin á heimamarknaðinum er, saman við krøvum frá almennari síðu til marknaðarføring, keyp og annað, tess betur klára fyritøkurnar seg í kappingini á útlendska marknaðinum. Tað er sjálvandi tí at tær tá eru vanar við at arbeiða undir hesum krøvum.

Fyri at røkka hesum máli, er neyðugt við einum miðvísum brúkarapolitikki og einum virknum brúkarasamtaki, ið alla tíðina setur brúkaramál á politisku dagsskránna. Hetta vil, saman við einari skipaðari almennari upplýsing, skapa teir røttu karmarnar fyri okkara vinnu at mennast og búnast í. Tí kunnu vit einans fegnast um, at landsstýrið nú endurskoðar kappingarlógina, og sum eitt annað týðandi stig, hevur sett sær fyri at arbeiða fram ímóti einari marknaðarføringarlóg.

# Tíðindaskriv um eykaflokstingTjóðveldisfloksins

**Tjóðveldisflokkurin**
*Jóannes Dalsgarð, aðalstjórnarformaður*



Eftir at ivi er sáddur alment um heimildir og tíðarfreistir fyri innkalling til eykaflokstingTjóðveldisfloksins, hevur Starvsnevnd Tjóðveldisfloksins havt fund um málið og hevur havt samband við aðalstjórnarlimir kring landið.

Starvsnevndin er samd um, at mannagongdin hevur verið røtt. Men til tess at sleppa undan, at nøkur løgfrøðislig togtogan skal taka seg upp, og til tess at rudda allan iva av vegnum um formlig viðurskifti, verður eykaflokstingið, ið varð lýst at vera 20. nov. 2004, avlýst.

Ístaðin verður boðað til nýtt eykaflokstingsambært teimum freistum og mannagondum, ið lógir Tjóðveldisfloksins sambært §7 áseta fyri regluligt flokstingting.

Tískil verður hervið boðað frá, at eykaflokstingið verður:
**leygardagin 18. desember** 2004 í Tórshavn við hesi skrá:

1. Aðalstjórnarformaðurin setur flokstingið
2. Val av tingformanni og skrivara
3. Val av næstformanni Tjóðveldisfloksins
4. Innkomin mál - harundir broytingar í lógum Tjóðveldisfloksins
5. Upplegg og orðaskifti um andstøðupolitikk Tjóðveldisfloksins við atliti at:
   - fullveldismálinum
   - búskapar- og vinnumálum

Uppskot og innkomin mál skulu vera aðalstjórnarformanninum í hendi í seinasta lagi leygardagin 4. desember 2004.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Tankastroyggj um sosialt lógarsmíð

**Torfinn Hentze,**
*starvsnevndarlimur í Javna*

Skal einstaklingurin lagast eftir kørmunum, sum sosiala lógarverkið ásetur - ella skal sosiala lógarverkið og harvið karmarnir lagast eftir einstaklinginum?

Tað verður ofta sagt, at tá talan er um menniskju, eru øll originalar, har finnast ongi kopiir. Vísdómsorð. Men.....

Originalar ella ikki. Í hvussu so er, eru menniskju ymisk - við ymiskum tørvum. Eisini menniskju, sum bera brek, eru ymisk - við ymiskum tørvum. Eisini menniskju við sama breki eru ymisk - við hvør sínum ymisku tørvum. Hóast menniskju, ið eru darvaði av menningartarni, ofta verða nevnd í einum bólki sum "tey menningartarnaðu", so eru tey hvør sær ótrúliga ólík - og kunnu hvør sær hava ótrúliga ymiskar tørvir.

Tað sosiala lógarverkið - tað vil her siga sosialar lógir, kunngerðir, reglar og mannagongdir - er grundarlag og karmur um øll tey ymisku tilboðini, sum á ymiskan hátt eru ætlað at nøkta tørvin hjá tí einstaka.

Verður hugt eftir endamálsgreinum í sosiala lógarverkinum, so eru tær so væl orðaðar, at tær nøkta ella umfata ein hvønn sosialan tørv, hóast ymiskleika einstaka menniskjans.

Øðrvísi er við einstøku greinunum og orðingunum, sum koma aftaná, og sum í staklutum skulu lýsa, hvussu endamálsgreinin skal røkkast, tó at tær helst í flestu førum eru nøktandi fyri flestu einstaklingarnar.

Tað skerst tó ikki burtur, at tað alt ov ofta hendir, at einstaklingar eru so nógv "øðrvísi", at teir detta niður ímillum og fáa ikki sín serliga tørv nøktaðan til fulnar, vegna tess, at teir ikki kunna koma inn undir einstøku greinarnar og orðingarnar í lógarverkinum, tó at teir heilt greitt eru umfataðir av endamálsorðingini. Tað verður sagt, at tað er ikki heimild fyri nettupp tí tilboðnum, sum er best fyri hann, ella sum honum tørvar. Í staðin verður roynt við onkrum øðrum tilboði, sum heimild er fyri, og sum hann tí má lagast til, hóast øll vita at hetta ikki er nøktandi.

Tað, sum eg royni at lýsa við hesum, er, at tað sosiala lógarverkið, sum nú er galdandi, virkar sum ein karmur, ið ikki hóskar øllum einstaklingum. Summir einstaklingar hóska ella passa ikki inn í hesar karmar vegna sín ymiskleika og fáa tí ikki sín tørv nøktaðan. Verður roynt at tillaga hesar einstaklingar, so teir á onkran hátt fáast at passa inn í karmarnar, kann fylgjan verða, at tørvurin ístaðin fyri at verða nøktaður, sum jú ætlanin var, beint øvugt bara verður øktur ella versnar.

Lógarverkið átti í staðin fyri - ella kanska eisini - at havt møguleika fyri at tikið útgangsstøði í einstaklinginum sjálvum, útgreina hansara tørv/tørvir væl og virðiliga, og við útgreiningini sum grundarlag mynda teir karmar, honum nýtist fyri at fáa sín serliga tørv nøktaðan.

Óivað eru eisini pengar at spara her í longdini.

Roynd̄ir okkara gjøgnum tíðirnar og kanska serliga hetta seinasta árið hava víst, hvussu týdningarmikið tað kann vera, at laga tilboðið eftir persóninum í staðin fyri at laga persónin eftir tilboðnum.

Ein nýggj føroysk "Forsorgarlóg" er í gerð. Vónandi fer hon at kunna forða fyri, at nakar fer at detta niður ímillum í sosialu skipanum okkara framyvir.

### Lógarheiti

Sosiala lógin, sum regulerar tilboð og veitingar av ymiskum slag, verður í Føroyum í dagligari talu nevnd "Forsorgarlógin" í Danmark "Serviceloven" og í Noregi "Socialtjenesteloven".

Tað føroyska heitið gevur eitt negativt signal. Gevur einum stakkalakenslur. Kenslu av, at her er talan um tænastur, tú náðiliga kann biðja um. Meðan tað norska og tá serliga tað danska heitið gevur eitt positivt signal. Gevur einum kenslu av, at her er talan um tænastur, tú hevur krav uppá.

Vónandi fær nýggja føroyska "forsorgarlógin" eitt positivari heiti. T.d. "Sosiala Tænastulógin".

# Samstarv á fólkatingi

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Bý- og bygdaráðsvalið er av á hesum sinni, og borgarstjórar eru valdir í flestu kommununum. Eg vil í tí sambandi ynskja øllum, sum hava stillað upp fyri Sambandsflokkin, hjartaliga tillukku við valinum.

Sambandsflokkurin skal á øllum økjum vera ein álítandi samstarvsflokkur, har eitt orð altíð er eitt orð, og har allar avtalur eru bindandi fyri flokkin.

Nú er tíðin komin, hvar ið vit leggja bý- og bygdaráðsvalið afturum okkum, og taka næsta stigið. Fólkatingsval verður innan eitt ár, og Sambandsflokkurin fer at stríðast fyri at endurvinna henda sessin.

Eingin ivi er um, at ein fólkatingssessur kann bæði brúkast til at byggja samstarvið í ríkisfelagsskapinum upp við, og eisini til at bróta tað niður við. Tí hevur tað alstóran týdning, at tann sum situr í sessinum, vil virka fyri, at ríkisfelagsskapurin verður varðveittur og styrktur, heldur enn at brúka hann til at fremja fullveldi gjøgnum bakdyrnar. Eisini hevur tað týdning, at tann sum umboðar Føroyar á Fólkatingi, hevur tilknýti til flokkar og persónar í Danmark, sum virða Føroyar og føroyingar.

Sambandsflokkurin hevur líka síðani 1906 havt eitt gott samstarv við Vinstra, hvørs núverandi forsætismálaráðharri, Anders Fogh Rasmussen, hevur víst føroyingum stóra virðing (serliga um samanborið verður við undanmann hansara, Poul Nyrup Rasmussen — fyri ikki at tala um verandi andstøðuleiðara, Mogens Lykketoft). Tí fer Sambandsflokkurin millum annað at nýta fólkatingssessin til at gera sína ávirkan (so langt sum hon røkkur), fyri at tryggja, at sitandi stjórn kann halda fram eftir fólkatingsvalið, til gagns fyri Føroyar og føroyingar.

Samstarv er vegurin fram!

# Lívsins kelduvað

Hoyri fótafet,
tigandi harðmælt
spøk sum heimalomb
hørð sum torusláttur

sjónlig fótaspor
smá og stór

fylgi slóðini

sálin stendur føst
í fótafetinum

kendi tíni fótafet
løtt, føst, blíð, bleyt, hørð
kimilig, melodisk

geva ljóð
tínar kenslur, tankar
hugburður
sinnisrørsla
sál og lund
dúnmjúk-steinhørð

sálarheimurin sveimandi
gjøgnum likamið
darrandi beinagrind
hvør nerv, æðr á tremur
í stríðum streymum

spennandi tankar
vítt hugflog
fjøltáttað, víttfevnandi hugskot

fótafet sýna megi, kraft
máttloysi- einsemi
málrættar- endaleys
medvitandi

jarðbundin sveimandi
fótafet

komandi, farandi
slitin, tváað
hvørva
av tíðarinnar tonn

ljóðið hangandi í rúminum
eina lítla løtu
fjarandi

hvørvur innar í upphavið
á veingjum innar í fjarleikan
setur seg fast í minni
ella í gloymskuna

kvirran í nærveruni

hoyri síggi
tínar tankar
tíni orð

óteljandi
sum sandurin við sævarflóð

blóðreyð stríðshuga fótaspor
slóðin geisar víða
kærleiksbirtan ljómar

valdsharra fótaspor
lívsleiðin fyri hesum
hatur og myrkur

rættvísisins fótaspor
hvørja í grammleikanum

blákøld fótaspor
sorg, pína, ótti, angist
hvørva í fjarleikanum

lívsins kærleikans fótaspor
ongantíð hvørva
ótømandi kelduvað

**Sólmundur Joensen**
**2004**